## Tíðindamenn handtiknir í Norðurkorea

Norðurkoreanskir vaktarmenn tóku fyrradagin tveir amerikanskar tíðindamenn, sum sambært norðurkoreonsku myndugleikunum vóru komnir um markið at taka sjónvarpsmyndir. Menninir arbeiða hjá sjónvarpsstøðini Current TV, sum heldur til í Kalifornia. Tíðindini um handtøkuna eru eitt sindur ymisk. Suðurkoreanska sjónvarpið sigur, at teir báðir tíðindamenninir vóru í kinesiskum øki, men at teir norðurkoreonsku vaktarmenninir fóru um markið eftir teimum. Útlendsk tíðindafólk skulu hava serligt loyvi fyri at sleppa til Norðurkorea, og tey eru undir uppsýni alla tíðina, skrivar AFP.



## Roktúr í illveðri

Íslendski ísfiskatrolarin "Sturlaugur H. Böðvarsson", kom gjáranmorgunin á Reykjavík við 240.000 pundum, sum teir høvdu fiskað eftir fimm døgum. Av hesum vóru umleið 80 tons av kongafiski, og tað mesta av hinum var toskur, skrivar Morgunblaðið. Gunnar Einarsson, skipari, sigur við heimasíðuna hjá reiðarínum Grandi HF, at hann er sera væl nøgdur við fiskaríið, serliga tá hugsað verður um, at tað var illveður allan túrin, og at teir tað ofta var ivasamt, um teir yvirhøvur kundu koyra trolið út.

# Børnini eru altíð taparin

**Tá foreldur fara sundur, gift sum ógift, verður sum oftast bert ein tapari – tað einstaka barnið. Harafturat stendur pápin nógv veikari mótvegis lógini, og fær mamman í 9 av 10 førum foreldramyndugleikan**

PÁPARÆTTINDI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjár segði Jørgen Lorentzen við Sosialin, at síðan páparevolutiónin, sum seinastu tvey ártíggjuni hevur skapt eitt heilt nýtt emotionelt tilknýti millum pápan og børnini, er farin fram, so er trupulleikin við foreldramyndugleika vaksin, tá familjurnar verða sundurskildar.

Frambrotini í páparættindum hava sostatt skapt eitt nýtt sosialt paradoks, sum til tíðir kann verða sera trupult at hava við at gera, nevniliga at pápin byrjar at gera meir og meir krav um samveru við børnunum.

- Og tað vísir seg sum at tað altíð er barnið, sum er stóri taparin í slíkum førum, sigur Jørgen Lorentzen.

### Gloyma barnið

Í Føroyum er tað Ríkisumboðið, ið tekur sær av flestu sakum, har samvera millum foreldur skal ásetast, tá foreldrini ikki kunnu einast. Har hava tey eisini tikið hetta til eftirtektar, og sett ein, sum er kønur í barnamálum.

Tá pør skiljast, er tað ofta ein ógvuliga tung og hørð prosess, har nógv klandur um børnini kann fylla stóran part av tí. Tá er tað, at Ríkisumboðið kemur inn í málið, og má mekla millum foreldrini.

- Síðan tann køni í barnamálum fór til verka, so er talið av málum, sum enda á okkara borði umaftur og umaftur minkað munandi. Tað, sum møguliga er orsøkin til hetta er, at flestu foreldur hava lyndi til at gloyma barnið í stríðnum teirra millum, sigur Lene Moyel Johansen, ið er juristur og málsviðgeri hjá Ríkisumboðnum.



*Barnið er altíð stóri taparin, tá foreldur ikki kunnu semjast. - Hetta er sum oftast orsakað av at foreldur í opnum stríði hava lyndi til at gloyma, hvat er gott fyri barnið, sigur Lene Moyel Johansen, málsviðgeri og juristur hjá Ríkisumboðnum*

### Mamman stendur sterkast

Tann 1. apríl kom nýggj lóg í gildi í Føroyum, ið hevði fleiri batar við sær á økinum. Men samstundis sum henda lógin kom í gildi í Føroyum, fór hon úr gildi í Danmark, eftir at hava verið virkin har í yvir 10 ár.

Sostatt settu føroyinga eina í nútíðarhøpi sera konservativa lóg um foreldrarætt í gildi. Tað heldur John Johannesen, í øllum førum.

- Nýggja lógin staðfestir ikki veruliga nakran rætt. Her hava børn fyrst og fremst rætt til mammuna og so bara møguliga til pápan eisini. Børnini og páparnir eru harvið fyri løgfrøðiligum, menniskjansligum og kensluligum órætti, sigur John Johannesen í viðmerkingunum í skrivligum fyrispurningi til Anniku Olsen, landsstýriskvinnu á økinum.

- Ynskir annað av foreldrunum í eini konfliktstøðu at ógilda felags foreldramyndugleikan, kann viðkomandi fara í rættin og fáa hetta gjørt. Hóast rætturin metir, at bæði eru egnað sum foreldur, skal rætturin skera ígjøgnum og geva antin mammuni ella pápanum allan foreldramyndugleikan. Sambært hagtølum vinna mammurnar í 88 prosentum av tílíkum rættarmálum. Og so er aftur líka vítt sum sítt við javnstøðuni og við rættindunum hjá barninum og pápanum, sigur John Johannesen.

Sostatt stendur mamman nógv sterkast yvirfyri lógini, og í 9 av 10 førum vinnur hon rættin, tá bæði foreldur eru líka egnað.

Um so orðatakið »Fátt er sum faðir, einki sum móðir« er galdandi, er ilt at gita um.

# Ein avtala er altíð ein avtala

**Tá foreldur kunnu semjast við at avtala samverurættin sínamillum er tað altíð gott. – Men hesar avtalur er líka nógv galdandi millum tvey foreldur, sum var hon gjørd umvegis Ríkisumboðið, sigur Lene Moyel Johansen**

PÁPARÆTTUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tapir tú foreldrarættin yvir einum barni, so hevur tú ikki eisini tapt rættin til samveru við barnið. Hesi eru greiðu boðini frá Ríkisumboðnum til pápar – og mammur – ið hava tapt foreldrarættin yvir barninum.

- Barnið hevur altíð rætt til samveru við bæði foreldur, og tað skal virðast. Er ósemja, kunnu tey venda sær til Ríkisumboðið. Tað sigur Lene Moyel Johansen, ið er juristur og málsviðgeri hjá Ríkisumboðnum.

- Hinvegin, hevur tú fullan myndugleika yvir barninum, so bestemmar tú also ikki 100 prosent hvussu nógv pápin sær barnið. Samvera hevur í veruleikanum einki við foreldramyndugleika at gera, staðfestir Lene Moyel Johansen.

Ein avtala er altíð ein avtala

Eitt, sum nógv ikki eftir øllum at døma ikki vita um, er virðið á eini avtalu millum tvey foreldur.

- Ein avtala er líka nógv galdandi og líka nógv verd, um hon er gjørd millum tvey foreldur sínamillum, ella um hon er gjørd millum foreldrini umvegis Ríkisumboðið. Har er eingin munur, sigur Lene Moyel Johansen úr Ríkisumboðnum.



*- Hevur tú fullan myndugleika yvir barninum, so bestemmar tú also ikki 100 prosent hvussu nógv pápin sær barnið. Samvera hevur í veruleikanum einki við foreldramyndugleika at gera, staðfestir Lene Moyel Johansen, (th)*